**Kvæðatilfar - Nr: 11**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** allir flokkar

**Uppgávuslag / heiti:** Hoyrispæl

**Vegleiðing:**

Næmingarnir arbeiða við at umskriva og/ella framføra kvæðið sum eitt hoyrispæl. Dømið niðanfyri úr Brestis kvæðnum kann nýtast til íblástur til sjálvi at leggja persónunum orðini í munnin ella til beinleiðis framførslu.

Søgan gerst meiri livandi, um næmingarnir eisini hugsa um at finna hóskandi ljóð, ið t.d. minna um sjógv, tá ið teir rógva, bardagaljóð, (jarn móti jarni) tá teir berjast o.s.fr..

**Kvæðatilfar - Nr: 11**

1.
Árla var um morgunin,
sólin roðar í hav,
Beinir gekk í skálan inn,
sum Brestir sterki svav.

Niðurlag:
Treðum lættliga dansin!
Dagurin skín so fagurliga,
komið er hægst á summarið.

Brestir:
Góðan morgun bróðir. Tað er gott veður at taka villan seyð í dag. Hygg hvussu vakur sjógvurin er við Lítlu Dímun.

Beinir:
Ja, lat okkum fara at veiða hasar villu seyðirnar í Lítlu Dímun.

4.
Tóku bond og bjargalínur,
gyrdu svørð við belti,
gingu so til strandar oman,
dreingir tveir teir eltu.

Sigmund:
Eg skal við út á Lítlu Dímun.
Í ár vil eg síggja hasar villu veðrarnar.

Tórir:
Babba, kunnu vit ikki sleppa við?

Beinir:
Hvat skulu tit gera á Dímun? Har er alt ov vandamikið fyri tykkum.

Sigmundur:
Hann, sum bara situr inni, kemur aldrin at nytta nakað sum helst.

Brestir:
Hatta er satt, sum tú sigur. Ungir dreingir eiga at royna seg. Tit skulu sleppa við.

10.
Tóku bát úr tøttum neysti,

**Kvæðatilfar - Nr: 11**

rangt var teimum sjógvað,
dreingir settust á rengur niður
og høvdingar at rógva.

11.
Løgdu teir at oynni inn,
bátin upp teir drógu,
gingu so í bergið fram,
sum brattar rásir lógu.

12.
Fótafimir og klófastir,
óttaðust ei nakað,
lupu lætt um leysar upsir
styggan seyð at taka.

13.
Fimm hundrað av áseyði
Lítla Dímun bar,
svart var alt sum kolamógvur,
eyðkent slag tað var.

14.
Stygt og kvikt sum villur fuglur,
vártreyst út av lagi.
So er sagt, at Hvalbingar,
teir tóku av alt slagið.

15.
Tykir mær tað harmiligt
at fara so um fæ;
fyrnsta seyð, í Føroyum var,
meg lysti enn at sæð

16.
Fullvæl dugdu høvdingarnir
vargaseyð at veiða,
gingu so at báti oman,
fongin við sær leiða.

17.
Hildu fram at Stóru Dímun,

**Kvæðatilfar - Nr: 11**

vildu vinna heim,
síggja trinnar miklar skútur
sigla móti teim.

18.
Albrynjaðar tríggjar tylvtir
taldu teir á førum;
glitra spjót og gyltir hjálmar,
sólin skein á svørðum.

19.
Brestir:
Hasi seglini og hasi drekastevnini kenni eg væl.

Hoyr Beinir, hvat skulu vit gera? Hasir menninir vilja drepa okkum.

Tann fyrsti hatta er Havgrímur. Nummar tvey er Gøtutróndur, og síðstur kemur Svínoyarbjarni.

Veðrið er soleiðis í dag at vit hava ein møguleika at náa Stóru Dímun. Klára vit upp í Kleivina, so kunnu vit høgga teir niður, sum tora at koma ímóti okkum.

Beinir :
Ja, vit skulu rógva at Stóru Dímun. Teir skulu ikki reypa sær av, at vit ikki góðu teimum mótstøðu.

27.
Hildu teir mót oynni inn,
herskip aftaná;
sóust rógva kappar tveir,
so hvíta mjøll dreiv frá.

28.
Armar orna, andlit rodna,
spennast sterkar spengur;
árar bogna, homlur togna,
skúmið dreiv um rengur.

29.
Rokið stóð um æsing inn
sum vestanveður hvast,
rendu so at fjørusteini,
at barkabandið brast.

**Kvæðatilfar - Nr: 11**

30.
Sigmundur og Tórir ungi
vóru ikki seinir,
lupu teir á landið upp,
Brestir og so Beinir.

31.
Hildu teir at hellu fram,
sum hamarsklettur var,
lyftu upp so dreingirnar
og settu niður har.

Brestir:
Beinir. Her koma vit at berjast, og tað lovi eg, at onkur skal doyggja áðrenn vit.
Tú skalt verja sunnanfyri. Eg skal standa her norðuri. Her er eitt sindur verri at verja.

34.
Havgrímur og Bjarni bóndi
fram mót hamri fara,
Tróndur við sínum fylgisveinum
reikar runt í tara.

35.
Roynast vildu reystir dreingir,
skjótt teir atsókn veita,
brøður høgga fast og hvast,
teir renna flógvan sveita.

36.
Brøður kundu brandar beita,
kendu væl til leikir;
reyðir gjørdust brynjuringar,
kjálkar gjørdust bleikir.

37.
Eldur reyk úr eggjateinum,
stál mót stáli smellir,
fimm so fullu kroppar niður,
heilin støkk um hellur.

38.
Beinir tveir til heljar hjó,

**Kvæðatilfar - Nr: 11**

og tríggjar Brestir sterki;
ota undan allir aðrir,
gleðast ei við verkið.

Havgrímur:
Tróndur, hví ganga tú og allir tínir mans sum seyður niðri í fjøruni? Eg gav tær jørð, tí tú skuldi berjast fyri meg.

Gøtutróndur:
Vit eru her sum eyka menn, klárir at hjálpa til, men álvara tos er tað ikki nóg mikið, at tit stríðast við 24 monnum móti tveimum? Og tú sum gongur og reypar. Var nakar maður í tær, stóðst tú sjálvur fremstur í bardaganum.

45.
Argur gjørdist Havgrímur,
ilskan vaks um mótið,
rendi hann mót Bresti upp
og legði til við spjóti.

46.
Spjótið gleið í miðju inn,
stál í indrum lendi;
Brestir gjørdi eitt avreksbragd,
hann banasár sær kendi.

47.
Trýsti hann seg á stungu fram,
blóð úr beni oysti,
høgdi so til Havgrím sterka,
øksl og arm hann loysti.

48.
Deyður dettir Havgrímur
og Brestir omaná.
Beinir berjist menniliga,
tó hann falla má.

Tóri ( situr og grætur )

Sigmund:
Tórir, nú er ikki at gráta. Hetta mugu vit minnast væl til, tí tá vit verða vaksnir, skulu vit nokk hevna okkum.

**Kvæðatilfar - Nr: 11**

Tróndur:
Hetta var ein góður bardagi og nógvir raskir menn eru farnir til Valhøll í dag. Gævi vit altíð minnast teir.

Eg haldi tó, at vit skulu ikki steðga her. Har sita tveir dreingir. Eg haldi, at vit skulu drepa teir.

Bjarni:
Nei, korta nei. Vit skulu ikki drepa børn sum hundar. Hasir dreingirnir skulu fáa frið at vaksa upp í Føroyum.

Tróndur:
Bjarni, tú hugsar ikki nóg langt. Veksa hasir dreingirnir upp, verða teir stórir og sterkir og uttan iva vilja teir hevna páparnar. Best at drepa teir nú soleiðis at tað verður friður hjá okkum at liva.

Bjarni:
Nú hevur tú fingið øði í meg ,Tróndur. Vilt tú drepa hasar dreingirnar, skalt tú fyrst drepa meg og mínar menn.

Tróndur:
Nú nú Bjarni. Róligur. Eg vildi bara fáa at vita, hvat tit halda. Eg síggi, at fleiri eri samdir við tær í hesi søk, tí skulu vit lata dreingirnar liva. Eg skal sjálvur taka mær av teimum og fostra teir upp, sum tað sømir seg fyri høvdingasynir. Teir skulu bæði læra lógir og søgu. Eisini skal eg læra teir ítrótt og vápnaleik.

60.
Heiðurliga teir høvdingarnar
jarða undir fløtu.
Tróndur tók so dreingirnar
og førdi norð í Gøtu.